# HEIMSSØGA

FRÁ 1900 TIL Í DAG



Hann tordi at gera gjøldur burtur úr Hitler. Eitt kent brot úr Charlie's Chaplin filmi, Einræðisharrin. Les meira um myndina innan á umslagnum.

NÁM

## Hvør vann kríggið

Í kríggi eru eingir vinnarar, bara taparar, verður sagt.

Tað skilir ein, lesur ein hagtølini frá fyrra heimsbardaga. Yvir 60 milliónir hermenn vóru í stríðnum. Av teimum fullu umleið 10 milliónir. Umleið 30 milliónir mistu bein ella arm, ella vórðu blindir av gassi ella granatpettum. Eitt heilt ættarlið av monnum í 20 ára aldrinum varð dripið.

Teir, sum lívbjargaðu sær, høvdu ofta skaða á hoyrnini og livdu við marruni frá helvitinum í skotgrøvunum. Allir høvdu teir mist onkran ella nakrar av bestu vinum sínum. Næstan øll húski høvdu mist onkran skyldmann.

Skip og bátar í túsundatali lógu á havsins botni. Húsini lógu í smildri, og akrarnir vóru fullir av granatholum, minum og píkatráði.

Tað ónda hevði, so ótýdligt tað ljóðar, tað góða við sær. Læknavísindini tóku seg eitt fet fram, skurðlæknarnir fingu meira enn nóg mikið av sundursorlaðum menniskjum "at royna" seg við.

### Frameftir fyri kvinnurnar

Longu síðst í 19. øld vóru kvinnurnar í Bretlandi farnar at stríðast fyri valrætti og javnstøðu millum kvinnur og menn, og við fyrra heimsbardaga varð støðan hjá kvinnuni í samfelagnum nógv sterkari enn áður. Bretskar




Undir fyrra heimsbardaga vórðu flogfør brúkt fyri fyrstu ferð. Tey smáu flogførini vóru góð til njósning, men tey vóru sein, og tað bar til at skjóta tey niður við eini vanligari riflu. Lupu fremmand flogfør á tey, hevði flogskiparin bara eina maskinbyrsu at verja seg við. Myndin sýnir enskar kvinnur sum flúgvimekanikarar. Veingir og motorar eru enn ikki komnir á. Tað hevur skund! Skjótt skal flogfarið í kríggj.

kvinnur í øllum samfelagsstættum gjørdu síni krígsátøk á heimahermótinum við at halda jarðarbrúk, ídnað og skúlar gangandi, meðan mannfólkini bardust móti fíggindanum á hermótinum. Nógvar kvinnur røktaðu eisini særdar hermenn á hernaðarsjúkrahúsunum.

Ein, sum stríddist fyri kvinnuligum valrætti í Bretlandi, var *Emmeline Pankhurst* (1858-1928). Hon var í einum felagsskapi, sum varð nevndur *suffragetturnar*. Limirnir vóru ikki nøgdir við friðarligar mótmælisgongur á gøtum og torgum. Tær brúktu ógvisligar framferðarhættir fyri at gera vart við seg. Tær blakaðu seg fyri hestavognar,

Á hesum postkortinum verða suffragettirnar spottaðar. Smábarnið grætur, tí at mamman er úti og mótmælir í staðin fyri at vera heima og taka sær av tí.




Politiið dregur eina suffragettu burtur.



framdu spreingimorðroyndir og brutu vindeygu. Løgreglan tók nógvar og fór illa við teimum. Emmeline Pankhurst sat fleiri ferðir í fongsli. Úr fongslinum helt hon fram við at stríðast við hungursverkfalli og fekk soleiðis gjørt vart við krøv síni. Undir sjálvum krígnum sleit hon stríð sítt og arbeiddi við at fáa herinum hermenn.

Beint eftir kríggið náddu Emmeline Pankhurst og suffragetturnar málum sínum – bretsku kvinnurnar fingu fyri fyrst avmarkaðan valrætt og seinni fullan valrætt (1928), eins og kvinnurnar í fleiri øðrum evropeiskum londum t.d. Danmark í 1915.

## Aldri aftur kríggj

Beint eftir kríggið varð Fólkasamgongan, FS, stovnað, ein heimsfelagsskapur, sum skuldi loysa stríðsmál við samráðingum: "Aldri aftur kríggj!" varð til eitt herróp. Men Fólkasamgongan varð ikki til tað, sum fólk høvdu vónað. Orsøkin var, at USA, tað einasta stórveldið, sum hevði kunnað sett megi aftan fyri avgerðirnar, varð uttanfyri.

Ein týdningarmikil spurningur fyri Fólkasamgonguna var at fáa gongd á avvápnanina. Tað vóru ov nógv vápn, og nógv lond høvdu ikki ráð til slíkt hervald. Norðurlondini vóru tey einastu, sum sjálvboðin avvápnaðu seg. Týskland varð noytt at gera tað. Øll onnur lond hildu fram at dubba seg hernaðarliga.

1. Fá meira at vita um Fólkasamgongana, FS. Hví var felagsskapurin stovnaður, og hvønn leiklut fekk felagsskapurin?
2. Tað var Wilson forseti, sum skeyt upp at stovna FS, og kortini fór USA ikki uppí. Fá greiði á, hvørji ríki vóru uppií, og hvørji ikki vóru uppií, og hvar høvuðsskrivstovan hjá FS endaði. Hugsa so um, hví FS miseydnaðist.

# Fólkaræði og mannarættindi

Okkum kann tað tykjast sjálvsagt, at øll menniskju skulu hava somu rættindi og skyldur í samfelagnum – sama ger kyn, tjóðaruppruna, útsjónd, brek, kynsliga áskoðan, átrúnað ella politiska fatan. Men í mongum londum er tað ikki sjálvsagt, og fyri ikki so langt síðan var tað heldur ikki sjálvsagt í Føroyum. Her eru nøkur áhugaverd árstøl.

